# Vágbingur sum víkingur



**Fyri hálvum øðrum ári síðani fór Karina Andreasen úr Vági til Íslands at arbeiða. Ætlanin var at koma heim til jóla 2006, men henni dámdi so mikið væl á Fjørukrónni í Hafnarfirði, at har er hon enn. Tey flestu skipini, sum koma inn í Íslandi fara í hesa havnina, og tá vitja manningarnar oftani á Fjørukrónni**

## Útiseti



**Kári Mikkelsen**
karim@sosialurin.fo

»Good evening«, heilsaðu vit í móttøkuni, eftir at hava trinið inn á Hotel Viking í Hafnarfirði fyri at innskriva okkum nakrar dagar í sambandi við ferðina í Íslandi »Góðan dagin, tykur kunnu gott tosa føroyskt«, var aftursvarið frá fryntligu móttøkukvinnuni á gistingarhúsinum. Unga kvinna innanfyri diskin vísir seg at vera Karina Andreasen, ið er ættað úr Vági.

Saman við tveimum vinkonum kom Karina Andreasen til Íslands á heysti í 2006 og ætlaði sær bert at verða til jóla sama árið, men mongum brestur ætlan. Henni dámdi so væl á gistingarhúsinum, ið eisini rekur matstovuna, Fjørukrónna beint viðsíðuna av, at hon gjørdi av at verða verandi, meðan tær báðar vinkonurnar fóru heimaftur.

Bæði Hotel Viking og Fjørukrógvin eru bygd í besta víkingastíli, og her ganga Karina Andreasen og hini arbeiðsfólkini øll í víkingabúnum, tá tey eru til arbeiðis.

Við eini frástøðu upp á bert 10 kilometrar frá miðbýnum í Reykjavík, liggur Hafnarfjørður sera sentralt fyri. Av tí sama koma nógv ferðafólk at gista á hotellinum ella fáa sær ein bita á Fjørukrónni.

Stórhvalabúffur er forkunnugur matur fyri føroyingar, men hjá okkum er hann torførur at fáa fatur á. Soleiðis er ikki í Íslandi, sum framvegis veiða stórhval til vísundalig endamál. Tvøstið verður sjálvandi ikki koyrt burtur og eitt av teimum støðum, sum hava stórhval á matskránni, er Fjørukrógvin í Hafnarfirði.

Hetta fingu vit útsendu hjá Sosialinum at sanna, tá vit vitjaðu vælumtókta staðið í býnum og fingu matskránna í hendi. Vit royndu stórhvalatvøstið og fóru ikki vónbrotnir avstað aftur.

Her koma vitjandi frá øllum londum, og sjálvandi eisini úr Føroyum. Háárstíðin er frá síðst í mei til út í september. Summarmánaðarnir er stórt sæð fult altíð, sigur Karina Andreasen, sum dámar sera væl í Íslandi og fyribils ongar ætlanir hevur um at flyta heimaftur. Men

Sosialurin